

**Øll skip bunkra við bryggju, og tá bunkrað verður, verður sperra løgd rundan um skipið, so tryggleikin er størstur**

SNORRI JØKLADAL

# ugla-

**Tá mest er at gera, skulu kanska eini 10 skip avgreiðast eitt vikuskifti, og tað er eisini komið fyri onkuntíð, at tey øll skulu hava loðs**

RÓLANT HØJSTED

við stórum útlendskum skipum, sum koma at bunkra tungolju.

Rólant Højsted sigur, at Fuglafjarðar havn loyvir ikki stórum skipum inn á vánna uttan so, at tey hava loðs – ella at tey eru rættiliga staðkend.

– Men tað eru eisini tey flestu skipini, sum sjálvi vilja hava loðs, leggur hann aftrat.

### Hóvligur vøkstur

Árið 2010 royndist annars væl hjá Fuglafjarðar Havn. Vitjaninar øktust úr 759 skipum í 2009 upp í 855 skip í 2010. Bruttotonagan (BT) øktist úr 1.370.000 í 2009 upp í 1.644.000 í 2010.

Rólant Højsted vísir á, at av samlaðu vitjanunum í 2010 vóru tey 254 skipini útlendsk, og umboðaðu hesi 1.100.000 BT. Samlaði vøruflutningurin yvir bryggjukantin var í 2010 tilsamans 265.000 tons – og í 2009 var hann 300.000 tons.

– Minkingin stavar frá fleiri vørubólkum, sigur hann.

Samlaðu inntøkurnar hjá Fuglafjarðar Havn vóru í 2010 umleið 7,7 miljónir krónur, og hetta er einar 800.000 krónur meiri enn í 2009.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Snorri stjórnar Effo Bunkers

**Í juli í ár eru trý ár, síðan Fuglafjarðar havn fór at veita skipum tungolju, og í dag er tað Effo, sum rekur virksemi**




*- Russisk skip eru størstu kundarnir hjá Effo Bunkers og næstir teimum koma føroysk skip, sum brúka tungolju, sigur dagligi leiðarin, Snorri Jøkladal*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vilmund Jacobsen

Snorri Jøkladal, sum er dagligur leiðari á Effo Bunkers, sigur, at útboðið hjá oljuterminalinum er trý sløg av tungolju. Men oljan, sum verður veitt skipunum, kann eisini blandast – ella miksast - eftir ynski og tørvi.

– Vit hava tað, sum rópt verður hásvávur og lágsvávul olju. Hitt triðja slagið kunnu vit eftir ynski og tørvi blanda upp hini bæði sløgini – alt eftir, hvat skipini vilja hava, sigur hann.

Uttan at fara út í smálutir, sigur dagligi leiðarin, at hásvávul er loyvdur at brenna allastaðni uttan í Norðsjónum.

Í Fuglafirði hevur Effo Bunkers tríggjar stórar oljutangar til sínar veitingar av tungolju.

### Russar keypa mest

Snorri Jøkladal vísir á, at russisk skip eru størstu kundarnir hjá Effo Bunkers og næstir teimum koma so føroysk skip, sum brúka tungolju.

– Nú svartkjaftakvotan er vorðin so lítil og minni er at lata russum av svartkjafti, kunnu vit eisini rokna við færri russiskum skipum, sum koma á Fuglafjørð at bunkra. Soleiðis kann marknaðurin hjá okkum eisini ávirkast av kvotum, sum Føroyar býta við aðrar.

Leiðarin sigur, at tað serliga eru føroysku uppisjóvarskipini, sum bunkra tungolju í Fuglafirði, men tað eru eisini onnur føroysk skip, sum brúka hesa olju. Haraftrat koma so onnur útlendsk skip, sum sigla fram við Føroyum og skulu bunkra á síni farleið.

– Smyril, sum eisini brúkar tungolju, bunkrar á Sundi, og Norrøna man fyri tað mesta bunkra uttanlands, sigur Snorri Jøkladal.

Hann leggur aftrat, at flestu av teimum stóru nýggjaru føroysku skipunum eru bygd til tungolju, meðan nøkur skip eru umbygd til at brenna tungolju.

### Alt við bryggju

Effo Bunkers bunkrar øll skip við bryggju, og tá bunkrað verður, verður sperra løgd rundan um skipið, so tryggleikin er størstur.

– Hetta verður gjørt, hvørja ferð vit bunkra eitt skip her hjá okkum. Vit eiga sperruna, men tað er vanliga lokali sleipibáturin, Pilot, sum ger hesa uppgávu fyri okkum, sigur dagligi leiðarin hjá Effo Bunkers, Snorri Jøkladal.

## Rós til Rólant

Snorri Jøkladal sigur, at Effo Bunkers hevur gott samstarv við Havnarskrivstovuna í Fuglafirði og havnarstjóran, Rólant Højsted, sum er myndugleikin yvir teimum.

– Eg haldi, at Rólant er skilamaður. Vit hava eitt gott samstarv, og eg havi alt gott at bera honum, sigur dagligi leiðarin á Effo Bunkers í Fuglafirði.

Sigurd Simonsen, borgarstjóri, er eisini fegin um tað arbeiði, sum Rólant Højsted og hansara menn gera við havnalagið.

– Eg haldi, at vit virkuliga hava fingið ein kapasitet við Rólanti Højsted, sigur borgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu.

*vilmund@sosialurin.fo*